# Botnliðið snýtti B68

**Hóast toftamenn høvdu bóltin í fýra fimta partum av tíðini, so megnaðu teir ongantíð at spæla seg til upplagdar málmøguleikar**

B68–TB
*Jóannes Hansen*



*Eftir sannførandi tapi á Eiði mikukvøldið, hevði fáur væntað, at TB fór at gera nakað toftamenn á Svangaskarði*
*Mynd: Savnsmynd*

Toftamenn iðra seg, og tað er væl skiljandi. Teir vóru stórfavorittar ímóti TB, men á grasinum á Svangaskarði megnaðu teir ikki at fáa mál, og harvið fingu teir bara eitt stig burturúr. Um teir høvdu fingið fulla úrtøku, so høvdu teir verið undir liðini á grannunum úr NSÍ og bara tvey stig frá oddaplássinum hjá HB.

Tvøroyri er lagið gott.

– Tá vit mikukvøldið vóru á Eiði, var ætlanin at vinna dystin. Vit taptu 4–0, men tað haldi eg var ríkiliga nógv. Ta ferðina vóru vit óhepnir í 1. hálvleiki. Hesa ferð høvdu vit umskipað liðið. Vit fóru á Toftir eftir málleysa javnleikinum, og vit fingu hann. Eg má rósa spælarunum fyri eitt disiplinerað og gott avrik, er skoðsmálið, sum Lynge Nielsen hevur til sínar spælarar dagen derpå.

TB venjarin hevði gjørt radikalar broytingar. Sasha var tøkur aftur, og tað kom væl við, tí undir venjing fríggjakvøldið fekk Allan Michelsen ein vøddaskaða. Óli Johannesen var hesa ferð aftasti maður í verjuni, og har brúkti hann allar sínar royndir, tá hann stýrdi verjuni. Vladimir hevði sum høvuðsuppgávu at taka sær av Anders Nygaard, og tað megnaði hann sera væl. Anders var onkra ferðina tætt við, men tað eydnaðist honum ongantíð at koma púra leysur.

### Lítið hugflog

B68 tóktist taka uppgávuna í álvara, men teir megnaðu ongantíð at vísa, hvør náturligi munurin eigur at vera á einum liði, sum stríðist fyri at hanga uppi í kappingini um meistaraskapin og eitt lið, sum stríðist fyri at sleppa undan niðurflytingini.

B68 fekk ikki ferðina upp, og harvið eydnaðist tað væl hjá TB at byrgja fyri í borðunum. Arnold Joensen og Øssur Hansen komu sjáldan til baklinjuna, og tað var ongantíð soleiðis, at innleggini gjørdust vandamikil, og tað kom so at siga ikki fyri, at onkrir av góðu bóltspælarunum megnaðu at sneiða seg leysar av mótstøðumonnunum og harvið skapa yvirtalsstøður.

Lars Müller var góður í TB málinum, og Óli Johannesen var avgjørdur, tá hann ruddaði upp.

– Tað einasta, sum restaði, var, at TB í einum mótálopi skoraði eitt mál og harvið fór við øllum, men tað hevði verið ov nógv av tí góða, siga teir á Toftum.

Dan Mortensen og Sasha mannaðu TB álopið, men teirra uppgáva var fyrst og fremst at taka lut í verjuspælinum, sum eydnaðist stak væl. Onkra ferðina smekkaðu TB spælararnir langt og høgt, men teir royndu eisini at spæla ímillum sín fyri at draga tíðina út.

Um B68 skal vera millum toppliðini, so eiga teir at vinna á heimavølli ímóti TB. Teir eru avgjørdir í, at teir ikki undirmettu TB, sjálvt um fleiri teirra mikukvøldið sóu teir tapa 4–0 á Mølini á Eiði. Tað hava teir ivaleyst upp á ein máta rætt í, men hugburðurin og avrikið stóðu ikki mát við tað, sum roknast kann við av oddaliði. Fróði Benjaminsen og Fríðin Ziskason vóru ikki tøkir. Men tá spælarar ofta eru leikbannaðir, mugu teir, sum eru eftir vera førir fyri at lyfta liðið, um tað skal vera í toppinum. Hesa ferð dumpaðu toftamenn. At tað var rómur millum tvørámenn var ikki at undrast á.

**B68:** Michal Kokoszanek – Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira, John Heri Dam – Marlon Jorge, Jann Ingi Petersen, Bogi Petersen – Arnold Joensen, Anders Nygaard, Øssur Hansen
**TB:** Lars Müller – Nebosja Urtajl, Óli Johannesen, Vladimir Matijvic, Milan Cimburovic – Bárður Dimon, Craig Dean, Einar Petersen, Jón Johannesen – Dan Mortensen, Alexander Radosavljevic

# Sumbingar halda fast

**Tað var umráðandi hjá bæði LÍF og Sumba at fáa ein sigur, um sambandið við FS Vágar skuldi varðveitast í toppinum í 2. deild. Og tað vóru sumbingar sum fóru suður um aftur við øllum stigunum, sum teir fingu uppá ein góðan fyrra hálvleik.**

2.DEILD MENN
*Bjartur Nolsøe*

Lítil ferð og lítið skipað spæl var í fyrra hálvleiki millum LÍF og Sumba leygardagin. Serliga vóru teir á heimaliðnum tamir, og vístu als ikki tað ágrýtni sum teir fyrr hava víst á heimavølli í ár.

Sumbingar sum helst høvdu ætlað at halda LÍF vekk frá stórum málmøguleikum í byrjanini á dystinum fyri síðani at leggja dent á mótálop, sóðu beinanvegin sín møguleika at verða við í dystinum. Leirvíkingar megnaðu í fyrra hálvleiki als ikki at leggja trýst á Sumba, sum ein annars hevði væntað.

### Sumba betri

Longu tá 10 minuttir vóru farnir kom fyrsta og einasta málið í dystinum. Sumba fekk fríspark úti í vinstru síðu, René Thomsen legði væl innfyri, har Eirikur Joensen var hægstur og setti høvdið á so bólturin fór í mál.

Eftir hetta vóru tað sumbingar sum sótu á dystinum og komu fram til teir møguleikar sum vóru. Fimm minuttir eftir málið, royndi Trygvi Nielsen seg við einum beinleiðis frísparki, men bólturin fór beint við síðuna LÍF- málinum.

Og tá hálvur tími var farin, var tað Hans Jacob sum royndi seg fyri sumbingar. Eitt fríspark kom innfyri, og hann kom at standa púra leysur men skallaði við síðuna av.

Meir hendi ikki í fyrra hálvleiki, har sumbingar vóru betri og høvdu uppiborið hálvleiksleiðsluna.

### Myndin broyttist

Í seinna hálvleiki broyttist myndin. Nógv meiri ferð var á spælinum og nú vóru tað leirvíkingar sum trýstu. Eisini sást at sumbingar løgdu seg aftur at verja leiðsluna. Hetta viðførdi sjálvandi, at nógv spæl gekk fyri seg á hálvuni hjá Sumba.

Tá 10 minuttir vóru farnir burdi LÍF havt javnað, tá innlegg kom flatt innfyri úr vinstru síðu, men sjálvt um Sigfríður stóð leysur við aftastu stong, megnaði hann ikki at fáa bóltin inn.

Løtu seinni høvdu leirvíkingar ein møguleika aftrat at javna, men Kristian í Vági brendi inni í 5-metrinum, eftir at Petur Sjúrðarberg var farin ígjøgnum í høgru síðu.

Aftaná hetta minkaði trýsti frá heimaliðnum, og tað vóru sumbingar væl nøgdir við. Teir royndu í sínum at fáa ferðina niður. Meginparturin av spælinum gekk fyri seg á miðjum vølli, og ongar veruligar royndir vóru á nakað av málunum.

Tá so 3 minuttir vóru eftir at spæla fekk LÍF enn einaferð ein gyltan møguleika at javna. Aftur var tað uppspæl í vinstru síðu, og við aftastu stong kom Bárður Heinason at standa fríur, men onkursvegna fekk hann skoti bóltin uppum málið.

Sostatt fingu sumbingar øll 3 stigini, sjálvt um tað onkuntíð leikaði hart á í seinna hálvleiki. Liðini áttu hvør sín hálvleik, men sumbingar dugdu tað sum lorvíkingar ikki dugdu, nevniliga at skora uppá ein av sínum møguleikum.

**Dysturin í tølum:**
LÍF-Sumba 0-1(0-1)
0-1: Eirikur Joensen



# B36 vunnu óvæntað á sandoyingum

**Eftir ósigurin, skulu sandoyingar ikki seta nógv stig til, um møguleikarnir fyri uppflyting ikki skulu svinna burtur í onki**

2.DEILD MENN
*Jákup Mørk*




*B36 vunnu heldur óvænta heim á Sandi í vikuskiftinum, og kunnu nú kenna seg eitt sindur tryggari í botnstríðnum*
*Mynd: Savnsmynd*

Leygardagin var B36 á vitjan heiman á Sandi, og heldur óvæntað fóru havnarmennirnir av Sandoynni aftur við øllum trimum stigunum. Eittans mál kom í dystinum, og tað fekk B36 tjúgu minuttir fyri leiklok.

Undan umfarinum í vikuskiftinum var B36 á næstaftasta plássi í 2.deild, meðan B71 lá ímillum ovastu liðini, so ósigurin má koma sandoyingum dátt við í teirra stríði um uppflyting.

### B36 væl mannað

Til dystin ímóti hevði B36 fleiri útisetar við, og tað sást eisini avgjørt aftur, tí 2.lið hjá B36 hevur neyvan verið so sterkt mannað í hesum kappingarárinum. Menn sum Herbert í Lon Jacobsen, Eyðun Højgaard, Finn Mørk og Jan Guttesen hava allir nógvar royndir við fyrstu deildar-fótbólti, og hetta kom væl við hjá B36 leygardagin.

Tvørturímóti vóru B71 nakað viknaðir, tí bæði skaðar og leikbann høvdu við sær, at allir mans ikki vóru tøkir. Ein polendingunum hevði leikbann, Jógvan Jón Petersen hevur ikki vant eftir summarsteðgin og Eirikur Hansen hevur brotið sær beinið, so sandoyingar vóru nakað sperdir til dystin leygardagin

### Vindharður fyrri hálvleikur

Rættiliga nógvur vindur var heiman á Sandi leygardagin, og hetta darvaði spælinum nógv. B36 hevði undanvind í fyrra hálvleiki, og hetta sást eisini aftur í býtinum av spælinum. Bólturin var einamest sandoyarhálvuni, men tað treyt við B36-málmøguleikum. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki kom tó ein B36-leikari at liggja væl fyri í B71-brotsteiginum, men Waldemar Noviscki bjargaði.

Serliga í fyrra hálvleiki sást lítið til tað flótandi spælið, men í øðrum hálvleiki batnaði. Vindurin linkaði nógv, og bæði liðini høvdu væl lættari at spæla.

B36 hevði eisini í seinna hálvleiki yvirvág í spæli, og spældu seg fram til fleiri møguleikar. Heini í Skorini var tvær ferðir leysur við Waldemar Noviscki, men B71-málverjin bjargaði báðar ferðir væl.

Einasta málið í dystinum kom tjúgu minuttir fyri leiklok. B36-framherjin, Heini í Skorini, varð feldur í B71-brotsteiginum, og dómarin var eirindaleysur, og dømdi brotsspark.

Karl Leonson varð settur at skjóta, og hann sveik ikki álitið. Eftir málið, royndi B71 at trýsta B36 , og tí einuferðina var veteranurin Eli Hentze rættiliga nær við, tá hann var so óheppin at raka tvørstongina við góðum skoti.

B36 helt fast tað sum eftir var av dystinum, og kunnu við teimum trimum stigunum kenna seg eitt sindur tryggari í botnstríðinum, meðan fyri sandoyingum hevði ósigurin við sær, at liðið ikki hevur ráð at seta fleiri stig til, um møguleikin fyri uppflyting framhaldand skal vera til staðar

**B71- B36 0-1 (0-0)**
0-1 Karl Leonson (br)

# Stendur onki til hjá fuglfirðingum

**Við sigrinum á ÍF eru runavíkingar á veg úr botninum í 2.deild**

2.DEILD MENN
*Páll Holm Johannesen*

Fuglfirðingar vóru undan kappingarárinum mettir at vera eitt av liðunum, ið fór at vera í kappingini um uppflyting í 1.deild. Fyrra helvt hilnaðist ikki so væl, og eftir ósigurin í Runavík leygardagin, skal rættilig vend koma í, um uppflytingin skal gerast veruleiki.

Prát hevur verið um, at fuglfirðingar høvdu ætlanir um styrkja um hópin í summarfrítíðini, men sum skilst, so er onki komið burturúr.

Sáttmáli við danan og fyrrverandi GÍ-leikaran, Martin Thomsen, var annars komin undir land, men Martin er framvegis so mikið skaddur, at einki røkist fyri, at hann verður klárur áðrenn kappingarárið í Føroyum er av, so tann avtalan verður av ongum.

### NSÍ effektivari

Dysturin leygardagin millum Eysturoyar liðini NSÍ og ÍF var ikki ein teimum betru. Hóast fleiri málmøguleikar vóru báðar vegir, so var onki leikligt flog yvir dystinum. Úr Runavík verður sagt, at dysturin var javnur, men í teimum avgerandi løtunum, vóru runavíkingar meira avgjørdir.

Fyrri hálvleikur endaði málleysur, hóast bæði lið høvdu fleiri royndir uppá. Stutt inn í seinna hálvleik eydnaðist tað Sverra Justinussen at leggja NSÍ frammum. Eftir at Mortan Hansen brýtur ígjøgnum í høgru síðu, endar bólturin hjá Sverra, sum ótarnaður kundi skjóta fyrsta málið í dystinum.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki vóru NSÍ aftur uppá spæl. Runavíkingar vinna bóltin langt uppi á ÍF-hálvuni, og Kristjan Poulsen strýkur ígjøgnum, og leggur bóltin framvið ÍF-málverjanum. Málskjúttin, Kristjan Poulsen, er toftamaður, og hevur skift felag í summarsteðginum, og í sínum fyrsta dysti fyri teir svørt-gulu, eydnaðist tað honum at gera mál fyri NSÍ.

Løtu seinni svaraði ÍF aftur. Við einum hørðum frísparki, ið rakti ein NSÍ-leikara á vegnum, fekk Ken Bærentsen minka um munin til 2-1

### Tvey reyð kort

Fuglfirðingar spældu síðstu løtuna við níggju monnum, eftir at tveir mans vórðu riknir av vølli.

Við níggju monnum spældu ÍF seg kortini fram til málmøguleikar, og við hepni kundu teir fingið okkurt málið og harvið eisini stig, men runavíkingar hildu fast tað, sum eftir var av dystinum

Við sigrinum eru runavíkingar á veg úr botninum, har teir hava ligið í alt ár. Hjá fuglfirðingum kom ósigurin illa við, tí frástøðan til oddaliðini er um gerast ov stór til, at teir veruliga kunnu vera við stríðnum um uppflyting.

**Dysturin í tølum:**

| | |
|---|---|
| NSÍ-ÍF | 2-1 (0-0) |
| 1-0 | Sverri Justinussen |
| 2-0 | Kristjan Poulsen |
| 2-1 | Ken Bærentsen |



*Rættiliga vend skal koma í, um fuglfirðingar skulu gera sær nakra vón um uppflyting í ár.*